gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Finnbogi Arge gekk undan

**Hugburðsbroytingin í príspolitikkinum í føroyskari flogferðslu byrjaði longu, meðan Finnbogi Arge var landsstýrismaður við vinnumálum, sigur Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air í ískoyti til viðtalu í Sosialinum**



*Bjarne Hansen*

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Tað var meðan Finnbogi Arge sat við vinnumálum í Landstýrinum, at hugburðsbroytingin á ferðseðlaøkinum byrjaði, sigur nevndarformaðurin í Maersk Air.

Hetta sigur hann í ískoyti til viðtalu, sum Sosialurin hevði við hann í seinastu viku, har hann segði, at broytingin hendi í tíðini hjá Bjarna Djurholm.

– Rætt er, at Bjarni Djurholm hevur ført hugburðin víðari, sigur Bjarne Hansen, og leggur dent á, at hann er rætt endurgivin í Sosialinum. Men tað er kortini at gera Finnboga Arge órætt púra at gloyma hann burtur, ger hann vart við.

### Lasse við síðuna av

Í viðmerking til samrøðuna við Bjarne Hansen, sigur fyrrveradi landsstýrismaðurin, Lasse Klein, í Sosialinum hósdagin, at um príspolitikkurin hjá feløgum sum Maersk Air og Bjarna Djurholm sleppur at halda fram, verður føroyskum vinnulívi ikki lív lagað. Tí tá kunnu altjóða fyritøkurnar við nógvum peningi mestsum gera sum tær vilja, heldur hann. Og hann gevur ikki Atlantsflogi stórvegis møguleikar móti Maersk Air.

Til tað sigur Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air, at her rakar Lasse Klein heilt við síðuna av.

Júst í hesum árinum, flogið hevur verið við nógvum tilboðum og lágum prísum, klárar Atlantsflog at kunngera ein roknskap, sum vísir 10 milliónir krónur í yvirskoti, vísir Bjarne Hansen á.

Hann staðfestir, at lágu ferðaseðlaprísirnir seinasta árið hava gagnað teimum ferðandi.

– Og teir tykjast so heldur ikki at hava skatt Atlantsflog, eftir roknskapinum at týða, sigur Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air.

# Hetlendingar í SMS




*Fólkatónleikarar eru eisini við á søluframtakinum hjá hetlendsku ferðavinnnuni í SMS*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hetlendska Ferðaráðið stendur fyri søluframtaki á Torginum í SMS í dag og í morgin**

FERÐAVINNA

Hetlendska Ferðaráðið hevur í hesum døgum framsýning á Torginum í SMS. Endamálið er, sum vera man, at fáa fleiri føroyingar at ferðast til Hetlands.

Á Torginum í SMS er ein básur settur upp, har tú finnur ørgrynni av faldarum, bóklingum og øðrum, sum sigur tær frá grannalandinum fyri sunnan, Hetlandi.

Plakatir eru hongdar upp, og fryntlig fólk ganga og siga frá tí, sum tann forvitni vitjandi hevur hug at fáa at vita.

Ein teirra, sum varðar av hetlendska básinum í SMS, er Rebecca Hamilton, sum er Operations Director á hetlendska Ferðaráðnum, Shetland Islands Tourism.

Hon greiðir frá, at vitjanin er komin í lag í samstarvi við Smyril Line, sum sjálvandi hevur áhuga í, at fólk ferðast við Norrønu til Hetlands.

Framsýningin er løgd nú, samstundis sum mentanartiltakið í Tórshavn verður hildið í dag og í nátt.

Umframt faldarar, bløð og plakatir, er eisini eitt orkestur við hetlendsku fólkatónleikarum við á ferðini, og fara teir at spæla soleiðis av og á alla tíðina, meðan opið er í SMS í dag og í morgin, sigur Rebecca Hamilton.

**ej**

# Nýggjur ríkisumboðsmaður í Grønlandi

**Fyrrverandi skrivarin hjá forsætisráðharranum er útnevndur ríkisumboðsmaður í Grønlandi**

Grønland fekk í vikuni nýggjan ríkisumboðsmann, tá danska stjórnin útnevndi fyrisitingarleiðaran í Forsætismálaráðnum, Peter Lauritzen, til danskan ríkisumboðsmann í Grønlandi.

Peter Lauritzen, sum er 41 ára gamal, er útbúgvin cand. scient. pol. frá Århus Universiteti í 1988.

Hann var í starvi hjá Arbeiðsmálaráðnum, áðrenn hann kom í starv í Forsætismálaráðnum í oktober 1993.

Í tíð síni í Forsætismálaráðnum hevur Peter Lauritzen millum annað í tíðarskeiðnum 1994 til 1996 verið ráðharraskrivari hjá forsætisráðharranum.

Peter Lauritzen er giftur og eigur fýra børn, verður sagt í tíðindaskrivi, sum sent er frá Forsætis-málaráðnum í samband við útnevningina av nýggjum ríkisumboðsmanni í Grønlandi.

**ej**




gult5 cyan5 magenta5 svart5





*Tórbjørn Jacobsen leyp fram av á viðgitna fundinum í mentamálstýrinum seinasta fríggjadag. Hann brikslaði lærarunum at renna politisk ørindi og nýtti so ógvusligan málburð, at lærarnir rýmdu, staðfestir fundarfrágreiðingin hjá Mentamálstýrinum*

Orrustan í Mentamálastýrinum:

# Ósamsvarandi frágreiðingar

**Fundarfrágreiðing frá Mentamálastýrinum staðfestir, at Tórbjørn Jacobsen leyp fram av og brikslaði lærarunum í Vestmanna at renna politisk ørindi**

MENTAMÁLASTRÍÐ
*Eirikur Lindenskov*

Rokið um orrustuna í Mentamálastýrinum seinasta fríggjadag heldur fram, og ósamsvar er millum tað, Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður greiðir frá um fundin og tað, sum embætismenn hansara og lærararnir í Vestmanna siga.

Mentamálaráðharrin stendur fast við, at tað er ósatt, sum leiðslan í Vestmannaskúla hevur greitt frá – fyrst í Sosialinum, seinni í útvarpinum, sjónvarpinum og í Dimmalætting.

Hóast lærararnir í Vestmanna skúla hava skrivað frágreiðing um málið og har staðfesta, at landsstýrismaðurin fyrst bað álitiskvinnuna fara av fundi, síðani bað annan varaskúlastjóran fara, tí hon brúkti eitt danskt orð, so stendur hann fast við, at hetta ikki passar. Eisini avsannar hann, at hann skal hava rópt eftir teimum, tá tey fóru, »at leiðslan í Vestmanna skúla er farin í politiskt valstríð fyri navngivnan tingmann í bygdini« og at hann at enda »bað skulaleiðsluna fara oman á barrikadurnar í Kollafirði og føra valstríðið víðari við áðurnevnda tingmanni«.

Tórbjørn Jacobsen segði í Útvarpi Føroya, at hann hevði tríggjar embætismenn, sum kundu vátta, at hetta ikki var satt.

Seinnapartin mikudagin sendi Hensar Ellingsgaard, deildarstjóri í Mentamálastýrinum, okkum frágreiðingina, sum embætismenninir í mentamálastýrinum, Hensar Ellingsgaar, deildarstjóri, Poul Nolsøe, fulltrúði og Janus Jensen, undirvísingarleiðari, hava skrivað. (frágreiðingin er prentað í fullum líki á blaðsíðu 7)

Í frágreiðingini stendur, at »Landsstýrismaðurin vísti á, at hann skilti ikki, hví Vestmanna skúli var farin í fjølmiðlarnar við hesum, tá ið tímatalið til skúlan var so lítið broytt í mun til seinastu nógvu árini. Hann helt, at hetta lættliga kundi skiljast soleiðis, at her vóru eisini orsøkir av politiskum slagi, ið lógu aftanfyri.«

Hetta staðfestir soleiðis, at Tórbjørn Jacobsen hevur brikslað lærarunum í Vestmanna, at teir runnu politisk ørindi, soleiðis sum greitt hevur verið frá m. a. í Sosialinum.

Í fundarfrágreiðingin hjá Mentamálastýrinum stendur víðari, at »Tá tosið fall á umrøddu prioritering av lærugreinunum í Vestmanna skúla komandi skúlaár stóðst mikil orðadráttur millum landsstýrismannin og umboðini fyri Vestmanna skúla. Av tí, at málburður landsstýrismansins í hesum sambandi var so ógvusligur, reistist annar av varaskúlastjórunum og segði, at fólk vóru á hesum fundinum, sum kundu vitna, at hon hevði sagt, at eingi politisk motiv vóru aftan fyri tiltøkini hjá Vestmanna skúla. Hon segði, at hon vildi ikki standa modell til tílíkan málburð og fór av fundinum«.

Í lesarabrævi í Dimmalætting týsdagin sigur mentamálaráðharrin um tíðindi um orrustuna í Mentamálastýrinum, sum fyrst varð prentað í Sosialinum, at: »Eingin av embætismonnunum í Mentamálastýrinum kennir søguna aftur soleiðis sum hon er endurgivin í Sosialinum. Hetta er heilaspuni úr enda í annan. Áhaldandi sosialdemokratiska heksajaktin, sum heldur fram haðartil mótstøðumaðurin er fallin á vali«

Í somu Dimmu, sum lesarabrævið hjá Tórbjørn Jaocbsen varð prentað, verða somu tíðindi borin á forsíðuni, sum tey í Sosialinum dagin fyri. Útvarpið og Sjónvarpið bóru eisini somu tíðindi týsdagin.

Nú eru tvær frágreiðingar, ein frá hvørjum parti, sum staðfesta, at landsstýrismaðurin er lopin framav.

Um hetta fær avleiðingar fyri landsstýrismannin, er enn ógreitt. Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, gav Tórbjørn »tað gula kortið«, sum hann málbar seg, tá Tórbjørn Jacobsen leyp fram av í november í fjør, tá hann kallaði løgmann ein danska leigusvein.

Um Tórbjørn Jacobsen so mikið sum traðkaði við síðuna av eina ferð afturat, so reyk hann sum landsstýrismaður, segði formaður Tjóðveldisfloksins.

Høgni Hoydal hevur enn ikki viljað gjørt viðmerkingar til málið, og tí er enn óvist, um tað fær avleiðingar fyri Tórbjørn Jaocbsen.

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

